# ASFALT skrivstovu á gongugøtuni

**Í næstu viku letur ASFALT upp nýggja skrivstovu í húsinum hjá Føroya Banka í N. Finsensgøtu 13. Ætlanin við skrivstovuni er at birta lív í tónleik á gongugøtuni.**

TÓNLEIKUR

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

ASFALT fer at húsast í øllum húsinum í N. Finsensgøtu, og verður skrivstovan opin frá í næstu viku og fram til stóra tónleikatiltakið fer av bakkastokki fríggjadagin 2. juni:

– Ætlanin við skrivstovuni er longu nú at skapa eitt livandi tónleikaumhvørvi á gongugøtuni. Fyrst og fremst verður húsið nýtt til fundarvirksemið, men somuleiðis ætla vit at geva øllum tónleikaáhugaðum møguleikan at støkka inn á gólvið. Vit hava m.a. lænt borð og stólar frá Tjóðpalli Føroya, so vit okkurt kvøldið kunnu hava jam-session o.a.m., sigur ein av fyrireikarunum Bogi Andreasen.

Fimm fólk fara dagliga at starvast á skrivstovuni, men Bogi Andreasen væntar, at fleiri og fleiri koma at arbeiða sjálvboðið, tá stóra tónleikatiltakið nærkast.




*Bogi Andreasen hevur her júst hongt 'ASFALT' plakátir upp í n‡ggju skrivstovuni. Í vikuskiftinum fara fyrireikararnir at hugna um og gera alt klárt til at lata upp fyri almenninginum mánadagin*

## 21 hundar dystaðust í seyðahundakapping

**Moss, Midge og Svan gjørdust nummar eitt í hvør sínum flokki,, tá 21 hundar dystaðust í sera tættari seyðahundakapping á Viðareiði leygardagin**

SEYÐA-HUNDAKAPPING

*Anna v. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Vinnararnir av seyðahundakappingini á Viðareiði leygardagin*

Síðsta leygardag var seyðahundakapping á Viðareiði. Hóast nakað kalt, var veðrið av tí besta, tá kappingin byrjaði kl 10. Slíkar kappingar verða skipaðar í ýmsum flokkum og á ýmsum torleikastigum. Dugnaligastu hundarnir kappast í flokki trý, sum eisini hevur tær torførastu avbjóðingarnar.

**Ymsar avbjóðingar**

Fyrsta uppgávan hjá hundunum var at reka á leið fimm seyðir hvørja ferð gjøgnum ymisk portur. Síðani skuldu teir deila eitt størri seyðafylgi upp í tveir bólkar. Seinasta avbjóðingin hjá hundunum var at reka seyðafylgið í rætt og síðani finna og reka ein ávísan seyð úr mongdini.

Til at leiðbeina hundarnar í eini slíkari kapping, standa eigarnir á síðulinjuni og bríksla ávís signal. Ymiskt er, hvussu nógv signal verða brúkt. Summir eigarar brúka eini 10-12, meðan aðrir ikki hava tørv á fleiri enn eini fimm. Allir hundarnir, sum vóru við í kappingini leygardagin, verða vanliga brúktir sum seyðahundar.

Kappingin helt á allan dagin til um fimm tíðina. Tá varð farið oman í gamla skúlan, har borgarstjórin á Viðareiði, Árni Absalonsen, handaði vinnarnum steyp og heiðursmerki. Síðani varð farið til borðs, har luttakararnir fingu smyrjibreyð og ein góðan drekkamunn.

Kappingin var sera væl eydnað, frætta vit frá stigtakarnum. Til samans 21 hundar tóku lut, og gjørdust úrslitini hesi.

**Flokkur 3: (bestu hundarnir í landinum)**

1. Moss við Absalon Hansen, Tórshavn 106 stig
2. Hvess við René Hansen, Nólsoy 106 stig
3. Meg við Eyðstein Jensen, Tórshavn 104 stig
4. Ben við Eyðstein Jensen, Tórshavn 102 stig
5. Mirk við Absalon Hansen, Tórshavn 99 stig
6. Jim við Absalon Hansen, Tórshavn 95 stig
7. Odd við Erik Hansen, Bøur 92 stig
8. Ravn við Erik Hansen, Bøur 83 stig
9. Marta við René Hansen, Nólsoy 72 stig
10. Peik við Hanus Højgaard, Tórshavn 68 stig
11. Snøgg við Kjeld Nattestad, Mykines 42 stig

**Flokkur 2:**

1. Midge við Jógvan A. Petersen, Sørvágur 79 stig
2. Glenn við Torbjørn Poulsen, Bøur 60 stig
3. Flekk við Jákup Jacobsen, Haraldssund 42 stig
4. Jack við Gerhard Hansen, Miðvágur 41 stig
5. Puk við Jónleif Jørgensen, Miðvágur 30 stig

**Flokkur 1:**

1. Svan við Ellef Ellefsen, Sørvágur 73 stig
2. Roy við Absalon Hansen, Tórshavn 71 stig
3. Jim við Tróndur Petersen, Viðareiði 54 stig
4. Nap við Eyðstein Jensen, Tórshavn 51 stig

## Mótakvøld í Vági

Mótakvøld við mótasýning, ráðgeving innan andlitsviðgerð og litavali verður í VB – húsinum leygarkvøldið 4. mars. Tað er ungdómsdeildin hjá VB/Sumba, ið skipar fyri hesum eitt sindur alternativa háttinum at savna pening inn.

Møguleiki verður at fáa ráðgeving innan andlitsviðgerð frá Maiken Sandá, vakurleikaserfrøðingi. Eisini verður mótasýning við klæðum frá Sirri, Toystovuni í Vági, Reinfan og Heimavirkinum

Dansigenturnar úr Vági, ið vunnu gull í kappingini hjá Tvøroyrar Fimleikarfelag, fara eisini at luttaka og sýna síni kynstur fram. Kaffi og køkur verða til keyps.

**nud**

## Upptøkukonsertir við Mariu Guttesen

Nú um vikuskiftið fer Maria Guttesen at hava tvær konsertir í Århus, ið verða tiknar upp við útgávu fyri eyga. Á konsertunum fer Maria at spæla klaver og syngja nýggj løg, men eisini okkurt gamalt lag hjá henni verður at hoyra.

Maria hevur gjørt flestu løgini sjálv. Lene Drachmann hevur sett orð til flestu løgini, Maria Salomon hevur sett orð til tvey og føroyska Elspa Metzdorff hevur sett orð til eitt lag.

Maria hevur boðið tónleikagestum at vera við á konsertunum. Tey eru føroyska Lena Anderssen, ið syngur og danin Morten Svenstrup, ið spælir cello, umfram Sophie Ziedoy sum verður kórsangari.

## Marius Olsen í Leikalund

**Í dag letur upp spennandi framsýning í Leikalund við grafiskari list hjá Mariusi Olsen**

LISTAFRAMSÝNING

Listamaðurin Marius Olsen arbeiðir bert við grafiskari tøkni. Menniskjað er miðdepilin í list hansara, og serstakliga ger hann nógvar sjálvsmyndir. Marius er ógvuliga eksperimenterandi í síni list, og setir ymiska tøkni saman, so sum silkiprent og etjing. Á tann hátt fær hann fram ein sermerktan poesi og sjáldsamar myndir, ið bert kunnu síggjast í góðum ljósið. Í ávísum høpum viðger Marius náttúruna og landslagið einsamøll, men aloftast við dramatiskum temaum.

Fernisering verður í Leikalund kl 16.00, og øll eru hjartaliga vælkomin.

Framsýningin er at síggja í upplatingartíðunum hjá Leikalund:
Mánadag-fríggjadag: 10.00-23.00



*Sermerktu poetisku myndirnar hjá Marius Olsen eru at síggja í Leikalund í løtuni*

Leygardag: 10.00-13.00 og 19.00-23.00
Sunnudag: 19.00-23.00

**ave**